# Jørgen Niclasen sá ongantíð umsóknina

**Jørgen Niclassen sá ongantíð umsóknina frá reiðarínum hjá Napoléon, áðrenn hann varð noyddur úr landsstýrissessinum. Hevði hann vitað av henni, hevði málið tikið aðra vend, sigur hann. Tvætl, svarar Tórbjørn Jacobsen**

VEÐHALD
*Edvard Joensen*



*Jørgen Niclasen er skelkaður av, at Tórbjørn Jacobsen søkir Fiskimálaráðið um at víkja fyri lánum hjá reiðaríið hansara, samstundis sum hann er við til at koyra landsstýrismannin frá fyri at hava gjørt júst tað sama fyri skip í sama bólki sum Napoléon*

Jørgen Niclaen er skelkaður av at frætta, at reiðaríi hjá Napoléon, sum Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður, er stjóri í, hevur skrivað til Fiskimálaráðið við umsókn um at víkja fyri lánum, samstundis sum stríðið um politikska lív landsstýrismansins í sama slag málum er upp á tað harðasta.

– Tað undrar meg ikki, at ein slík umsókn kemur, sigur Jørgen Niclasen, Men tað, sum skelkar meg, er dagfestingin á brævinum. Brævið frá reiðarínum hjá Napoléon er skrivað tann áttanda januar. Seks dagar áðrenn eg varð koyrdur frá sum landsstýirsmaður.

Jørgen Niclasen heldur uppá, at hevði hann vitað av hesum brævinum, áðrenn hann fór í tingið tann 14. januar, heðvi úrslitið av málinum verið heilt annað.

– So hevði eg kunnað víst Tjóðveldisflokkinum brævið, og teir høvdu so uttan iva tikið stuðulin til misálitisuppskotið hjá Sambandsflokkinum og Javnaðarflokkinum aftur, sigur hann.

– Tvætl, svara Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður og reiðari. Hatta hevði als ikki broytt støðu Tjóðveldisfloksins, tí hatta hevur einki við hvørt annað at gera.

Teir báðir, Jørgen Niclasen og Tórbjørn Jacobsen eru samdir um, eins og advokaturin hjá reiðarínum hjá Napoléon eisini í áðurnevnda brævi sigur seg vera, at tað er loyvt at víkja fyri lánum, eins og her er søkt um.

Men hóast Jørgen Niclasen heldur málini um Høgafoss og Arctic Viking vera av júst sama slagi, sum tað søkt verður um vegna Napoléon, heldur Tórbjørn Jacobsen ikki, at tey eru í familju við hvørt annað.

– Okey, sigur Jørgen Niclasen, Nú eri eg ikki so væl inni í familierum viðurskiftum. Men lat okkum so siga, at tey líkjast sum eineggjaðir tvíburðar.

– Nei, heldur Tórbjørn Jacobsen fast um. Frágreiðingin hjá Turid Debes Hentze staðfestir, at Jørgen Niclasen í tveimum førum hevur brotið lógina, og tí mátti hann frá. Her er talan um, at vit søkja um at vikið verður fyri kostnaði av at økja um virðið á einum skipi, og tað er lovt, sigur hann.

– Tað er júst tað, sum loyvt er, er Jørgen Niclasen, samdur við honum í. Og tað var júst tað, sum gjørt var í hinum báðum málunum.

Men nú fær Jacob Vestergaard, landsstýrismaður, ein risastóran trupulleika, vísir Jørgen Niclasen á. Tí hann kann ikki fara at játta Napoléoni at víkja fyri lánum, uttan at verða frákoyrdur millum annað av tjóðveldismanninum Torbirni Jacobsen, sum eisini er reiðari á Napoléon.

– Ikki uttan so at hann fyrst fær eina váttan frá øllum flokkum í Løgtinginum um, at tað ikki hendir, tá málið verður avgreitt, sigur Jørgen Niclasen.

# Ongin javnstøða uttan hagtøl

**Hagtøl um livikor føroyinga eru fyritreytin fyri einum mennandi almennum orðaskifti, sigur Beinta í Jákupsstovu granskari**

*Rigmor Dam*



Hvussu kunnu vit skipa hagtøl um vælferð, arbeiðsmarknað og javnstøðu, so tey í granskingarhøpi eru sambærilig um landamørk?

Soleiðis ljóðaði yvirskriftin á granskingarstevnuni, sum var í Havn í døgunum 27.-29. mars.

Og júst tátturin um javnstøðu og hagtøl var til viðgerðar á fyrra almenna fundinum á stevnuni, har staðfest varð, at tað er ein stór forðing í javnstøðuarbeiðinum í Føroyum, at vit ikki hava hagtøl, sum kunnu lýsa støðuna millum kynini. Ein av stigtakarunum til stevnuna, sum eisini legði fram, var Beinta í Jákupsstovu, sum er granskari við lærda háskúlan í Molde í Noregi. Beinta hevur seinastu árini gjørt kanningar um kvinnur í føroyskum kommunalpolitikki og hevur í hesum sambandi mangan rent seg fasta, tá tøl ikki eru tøk at nýta í granskingini. Í uppleggi sínum greiddi Beinta í Jákupsstovu frá um støðuna í Føroyum, tá umræður tøl, ið kunnu lýsa livikor føroyinga, og royndum hennara sum samfelagsgranskari at gera kanningar um kyn, vælferð og arbeiðsmarknað. Eitt nú hevur hon sett sær fyri, at samanbera vælferðarstøðið hjá kommunum sum, hava kvinnur í bý- ella bygdaráði, við tær kommunur har ongar kvinnur eru umboðaðar.

Sæðst tað aftur í politikkinum, um tær verða stýrdar av kvinnum ella monnum? Her er tað, sigur Beinta í Jákupsstovu, at stóra avbjóðingin kemur til sjóndar, tí tað finst nærum einki talgrundarlag, sum ger tað møguligt at samanbera kommunurnar.

Í fyrsta parti av kanningini skuldi Beinta í Jákupsstovu finna útav, hvørjar kvinnurnar eru, sum velja at stilla upp til kommunuval. Men av tí at hon ikki kendi føðingardagin hjá teimum uppstillaðu kvinnunum, kundi hon ikki fáa hesar upplýsingar. Næsta stig var at samanbera livikorini í ymsu kommununum, men heldur ikki hetta bar til, tí ongi tøl eru fyri slíkt í Føroyum. Einasta sum vit vita um kommunurnar, eru aldurs- og kynsbýtið hjá íbúgvunum, men einki um hvussu fólk liva ella hvørjum tey liva av. Hvussu nógv fólk eru í løntum starvi? Hvørja útbúgving hava fólk?

Hvussu er kynsbýtið og lønarbýtið? Vit vita tað ikki. Í framløgu sínari segði Beinta í Jákupsstovu, at hagtøl um livikor vanliga vera savnað, um tað frá politiskari síðu er ynski um, at eitt ávíst økið verður viðgjørt.

Umframt hetta eru hagtøl eisini amboð hjá bólkum í samfelagnum, sum ynskja meira ávirkan. Men tíverri hevur tað mangan verið so, segði Beinta í Jákupsstovu, at vit í Føroyum hava aftrað okkum við at gera hagtøl, sum kunnu siga okkum nakað um livikor og samfelagið sum heild, og at hetta sjálvsagt er eitt politiskt val. Tí spurningar, sum ikki koma upp at venda í orðaskiftinum, hoyra privatlívinum til, og harvið ikki almennu Føroyum.

- Tí er tað av alstórum týdningi at vit fáa nágreinilig tøl, sum kunnu lýsa samfelagsviðurskifti í Føroyum, og soleiðis kunnu skapað eitt betri grundarlag fyri almenna orðaskiftinum um føroyska vælferð, segði Beinta í Jákupsstovu.



# Norðuratlantsbólkurin í hernað móti stjórnini



*Hernaðarlógirnar eru fyrst og fremst galdandi fyri danska hervaldið í Føroyum.*

**Norðuratlantsbólkurin vil hava Fólkatingið at áleggja donsku stjórnini at strika hernaðarlógirnar, sum júst eru settar í gildi fyri Føroyar beint ímóti einari løgtingssamtykt. Danskir politikarar øtast um framferðina hjá stjórnini**

HERNAÐARMÁL
*Ingi Rasmussen*

Norðuratlantsbólkurin í Fólkatinginum ger bart.

Føroyski fólkatingsmaðurin Tórbjørn Jacobsen hevur vegna bólkin lagt uppskot til samtyktar fyri Fólkatingið um at áleggja donsku stjórnini at taka hernaðarligu revsilógina, sum hon júst hevur lýst fyri Føroyar, av aftur.

Og líkt er til, at tað er ein møguleiki fyri at fáa uppskotið samtykt. Tí fleiri danskir flokkar og politikarar í Fólkatinginum øtast um ta viðferð, sum Føroyar hava fingið í málinum. SF, Eindarlistin, Javnaðarflokkurin og Kristiligi Fólkaflokkurin stuðla eftir øllum at døma Norðuratlantsbólkinum.

## Ímóti samtykt

Alt byrjaði, tá tað kom fram, at ein gomul donsk hernaðarlóg, sum framvegis var í gildi í Føroyum, loyvdi deyðarevsing í krígstíð. Hetta kom púra óvart á landsstýrið, og nakað av kjaki stóðst av hesum, tí tað var hildið at vera eitt óheppið tekin at senda út hjá einari framkomnari tjóð. Í Danmark var deyðarevsingin langt síðan tikin av, tí teir høvdu sett eina nýggja hernaðarlóg í gildi í 1973.

Onkursvegna var lógin ongantíð dagførd í Føroyum. Í 1992 svaraði landsstýrið kortini stjórnini, at føroyingar ikki ynsktu nýggju lógina. Og so hendi onki meira.

22. november 2001 samtykti løgtingið einmælt, at gamla lógin skuldi strikast, so deyðarevsingin fór úr gildi. Samstundis varð gjørt greitt, at ongin hernaðarlig revsilóg skuldi vera í Føroyum, tí tað var óneyðugt. Samtyktin varð send víðari til danskar myndugleikar 4. desember 2001.

Hóast hetta setir danska stjórnin, umvegis ríkisumboðið, nýggju hernaðarligu revsilógina í gildi fyri Føroyar við at lýsa lógina í kunngerðarblaðnum tann 27. mars 2003. Saman við lógini er bunki av øðrum gomlum kunngerðum og kongligum fyriskipanum, sum viðvíkja hervaldi og krígsstøðu. Hvørki landsstýrið ella løgtingið eru spurd eftir.

## Løgmaður tegir

Rokningin fyri at lýsa lógirnar, 43.000 krónur, verður send til føroyska løgmálaráðið.

– Hetta er ein grov provokatión. Vit fara ikki at gjalda rokningina, og vit fara ikki uttan víðari at lata okkum lynda, at hernaðarlógirnar eru settar í gildi ímóti okkara vilja. Síðsta orðið er ikki sagt, og eg fari at venda mær til løgmans við málinum í eini vón um, at vit kunnu taka tað upp í felag, sigur Høgni Hoydal, landsstýrismaður við lógarmálum.

Men løgmaður hevur sum skilst onga ætlan um at taka málið upp. Hann vil ikki gera viðmerkingar, tí tað er ikki hansara borð, og tað er heldur ongantíð viðgjørt, sigur hann.

## Eitt álitisbrot

Tað er neyvan áður komið fyri í 55 ára søguni hjá føroyska heimastýrinum, at danskir myndugleikar hava sett eina lóg í gildi fyri Føroyar, eftir at Føroya løgting áðrenn hevur samtykt tað øvugta.

Nú hevur so Tórbjørn Jacobsen fólkatingsmaður tikið málið upp í Fólkatinginum og har vil hann hava Fólkatingið at áleggja donsku stjórnini at taka lógirnar aftur.

– Við sínari gerð hevur danska stjórnin brotið tað álit, sum hóast alt er bygt upp millum føroyskar og danskar myndugleikar um gildiskomu av lóggávu í Føroyum. Hon hevur brotið siðvenjuna ígjøgnum 55 ár. Hon hevur brotið ta hevd, at Føroyar eru ein sjálvstøðug løgfrøðilig eind, sigur Tórbjørn Jacobsen í viðmerking til uppskotið.

Vónirnar um, at uppskotið fer at vera samtykt eru góðar, tí fleiri danskir politikarar hava sum nevnt longu givið sína ónøgd til kennar í seinastu Fregnum.

## Undrast stórliga

Ein teirra, sum undrast stórliga, er Jeppe Kofoed, næstformaður í danska Javnaðarflokkinum.

– Eg skilji ikki, at stjórnin hevur gjørt hatta. Og tað er avgjørt nakað, sum eigur at vera tikið upp og kannað. Stjórnin, við Venstre á odda, hevur ið hvussu er í hesum málinum víst, at hon ikki røkir ríkisfelagsskapin. Og at hon ikki ein gang tosar við grønlendingar og føroyingar um hetta, er sera ódámligt, sigur Jeppe Kofoed.

Spurdur hvørja støðu SF hevur til, at hernaðarliga revsilógin er sett í gildi fyri Føroyar ímóti løgtingsins vilja, sigur formaðurin Holger K. Nielsen, at hetta gongur ikki, er sera álvarsamt, og verður tikið upp í Fólkatinginum.

Jan Sjursen, formaður í Kristiliga Fólkaflokkinum, kann heldur ikki góðtaka, at danska stjórnin einvíst hevur sett hernaðarligu revsilógina í gildi.

– Fólkatingið eigur sjálvsagt at taka hetta upp og krevja, at stjórnin greiðir frá, hvussu hon kann loyva sær tað. Tað er rætt og slætt skyldan hjá Fólkatinginum, sigur hann.

## Fakta

Uppskot til samtyktar í Fólkatinginum

»Idet Folketinget anerkender og respekterer, at Færøerne er en selvstændig juridisk enhed, pålægger Folketinget regeringen at tilbagetrække den militære straffelov fra 1973, som regeringen, uden Landstyrets viden og imod et enigt Lagtings beslutning, har bekendtgjort på Færøerne«

## Krígsglað stjórn knúgvar siðvenju

**Javnaðarflokkurin skjýtir upp í uppskoti til samtyktar, at hernaðarliga revsilógin, sum stjórnin hevur sett í gildi fyri Føroyar, verður tikin av aftur beinanvegin**

HERNAÐARMÁL
*Ingi Rasmussen*

Føroya Javnaðarflokkur tekur nú stig til at forða fyri, at hernaðarlógirnar, sum danska stjórnin hevur sett í gildi ímóti løgtingsins vilja, verða tiknar av.

– Hetta er ein spurningur um integritet hjá Føroya løgtingi. Vit vilja tryggja, at Føroya løgting varðveitir sítt vald sum lóggevandi ting í Føroyum. Ein krígsglað donsk stjórn skal ikki knappliga seta lógir og kunngerðir í gildi fyri Føroyar, sum vit ikki vita um. Tað ber ikki til, sigur Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins.

Javnaðarflokkurin hevur gjørt uppskot til ríkislógartilmæli, sum hevur við sær, at hernaðarliga revsilógin og aðrar kunngerðir, sum vóru lýstar 27. mars, verða tiknar aftur. Javnaðarflokkurin fer nú at fáa neyðugu undirskriftirnar til vega, so málið kann leggjast fyri løgtingið, hóast freistin er farin.

Jóannes Eidesgaard sigur, at tað eru tvey viðurskifti, sum hava fingið Javnaðarflokkin at ressast við.

Í fyrsta lagi brýtir stjórnin ta siðvenju, sum hevur verið galdandi í 55 ár, sum sigur, at heimastýrið hevur endaliga orðið, tá lógir vera settar í verk í Føroyum. Fyri tað næsta hevur løgtingið viðgjørt hernaðarligu revsilógina, og tá varð samtykt, at tær ikki skuldu setast í gildi.